# Fólkaræðið varðveitast í Fólkakirkjuni



**Talið av prestum skal hækka, og fakliga útbúgvingarstøðið skal vera so høgt sum gjørligt, so fólk fáa nøktandi sálarrøkt. - At fáa fólk at ganga meira í kirkju og at syrgja fyri, at tey fáa nakað við út aftur, metir Marjun Bæk vera eina av størstu avbjóðingunum hjá føroysku fólkakirkjuni**

*- Tað fakliga støðið skal vera høgt, bæði fyri at prestur skal røkka langt út, men eisini fyri at kirkjufólkið skal fáa eina ordiliga behandling, sigur ein avgjørd Marjun Bæk, og kemur her inn á spurningin um sálarrøkt. Hon metir nevniliga, at her krevst ein dygg útbúgving og eftirútbúgving. - Eg haldi, allir prestar skulu hava eyka útbúgving í sálarrøkt áðrenn, teir hava sitið 4 ár í starvi, sigur Marjun Bæk*

BISKUPSVAL

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Marjun Bæk, sóknarprestur í Kvívík, var tann av kandidatunum til biskupsvalið, sum seinast kom upp í tann almenna valdystin um biskupsembætið. Tó sigur hon seg hava stillarar úr nógvum bygdum og býum í landinum.

Hon man vera tann presturin í landinum, sum hevur verið eina ídnast at eftirútbúgva seg og dagføra sínar guðfrøðiligu førleikar. Á næstan hvørjum ári hevur hon luttikið á skeiðum, og eisini hevur hon sum nevnarlimur í Prestafelagnum arbeitt fyri at fingið teologiskar kapasitetir hendanvegin at halda skeið.

Hví hevur tú valt at lata teg stilla upp sum bispur?

- Eg bleiv spurd av ymiskum fólkum, sigur Marjun Bæk, ið leggur afturat, at hon hevði gjørt av, at fekk hon eina seriøsa áheitan, so tók hon hetta sum eina dygga álitisváttan.

- Men eg havi ongantíð gingið við einum biskupi í búkinum, sigur presturin á Kirkjuteigi í Kvívík.

Hvussu ætlar tú tær at vera ein góður leiðari fyri prestarnar og kirkjuna annars í Føroyum?

- At vera bispur er ikki stórt øðrvísi enn at vera prestur, bæði eru álitisstørv. Tað er sjálvandi eitt annað øki, tí tú skalt arbeiða við lógum, sum bispur eru øll prestagjøld tín sókn, og tú ert prestur fyri prestarnar og skal geva teimum góð arbeiðskor og stuðla teimum.

## Fleiri prestar

Marjun Bæk undirstrikar, at eitt av hennara aðalmálum er at veita góða eftirútbúgving, og at hetta skal verða lætt at fáa hjá prestunum.

- Eg kundi eisini ynskt at fingið fleiri prestar, tí so vóru fleiri uppgávur gjørdar, sigur Marjun Bæk.

Í dag eru 23 prestar í Føroyum umframt bisp og dómpróst. Spurd, hvussu nógvar prestar, hon ynskir vóru í Føroyum, sigur Marjun Bæk: 30.

Hon heldur, at sum er, eru prestarnir niðurbundnir av uppgávum, og hon kundi hugsað sær, at samskiftið millum t.d. skúlan og kirkjuna varð betri. Harafturat kundu prestar verið settir afturat at tikið sær av at gjørt nýggjar lestrabøkur, ískoyti til sálmabók, tilfar til konfirmantaundirvísing og stuðlað prestunum annars. Somuleiðis kundi ein prestur verið á Stiftsstjórnini, sum burturav tók sær av hesum.

Marjun Bæk undirstrikar, at hetta als ikki skal fatast sum ein kritikkur av núverandi leiðsluni í kirkjuni, men sum ein ásannan av, at fyri at røkka hesum endamálum er neyðugt at hækka talið av prestum upp í 30.

Marjun Bæk leggur eisini alstóran dent á, at hóast vit fingur 30 prestar í Føroyum, so skuldi deknaguðsguðstænastan ikki dottið burtur.

- Tað er ein fongur í okkara deknaguðstænastu, og eri glað fyri hana.

Spurd, um hon heldur tað vera realistiskt at fáa talið av prestum upp á 30, nú kirkjan er yvirtikin, sigur Marjun Bæk, at hon helt allatíðina, at lógarverkið skuldi verið liðugt áðrenn kirkjan varð yvirtikin, av tí at hetta nú kann koma at ávirka arbeiðið hjá komandi bispi. Røðan, sum helt ólavsøkudag fyri innbodnum døgurðaagestum á Føroya Tele, har hon m.a. segði, at tá Móses kom oman av fjallinum, hevði lógirnar við sær, men at í Føroyum eru kirkjulógirnar ikki lidnar enn, er longu vorðin til-tikin.

## Løgtingið skal skapa karmarnar

Marjun Bæk leggur fleiri ferðir samrøðuni dent á fólkaræðið í kirkjuni.

- Skipanin í kirkjuni er fólkaræðislig, og tað er ein góður eginleiki.

- Hetta er ein innbygd trygd í okkara skipan.

- Okkara kirkja hevur altíð verið fólksins kirkja. Hetta skulu vit ikki nerta við. Ein fólkakirkja er ikki



*Biskupskandidatarnir dystaðust í Miðlahúsinum sunnukvøldið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*